

## Kryvjivirkið liðugt 15. august

Í gjár kom ein fraktbátur á Sørvág við hesum stóra karinum, sum verður móttøkukar á nýggja virkinum, her rúmast 20 tons av laksi í. Seinasti laksurin verður kruvdur á gamla kryvjivirkinum nú hósdagin, fríggjadagin fara starvsfólkini á gamla kryvjivirkinum í summarfrí og tá tey byrja aftur um 15. august verður tað á nýggja kryvjivirkinum í Sørvági. Umstøðurnar á nýggja krivjivirkinum í Sørvági verða munandi betur enn á gamla virkinum. Har verður rúmsátt og arbeiðsligt, arbeiðsgongdin verður nógv lættari og eisini kann nógv meira fiskur verða kruvdur uttan stórvegis hóvasták.

## Bankastjórar skoraðu kassan

Leiðslan í Danske Bank hevur eftir øllum at døma tev fyri virðisbrævahandlum. Teir fimm, Jakob Broggaard, Peter Straarup, Tonny Thierry, Sven Erik Lystbæk og Per Damborg Skovhus, seldu nevnliga allir stóran part av partabrøvum sínum um tað mundið, tá Danske Bank partabrævið í fjør toppaði á kurs 271. Síðani er kursurin stútt dalaður. Á business.dk verður nevnt, at handilin hjá Peter Straarup við dagsins kursi hevði givið 10 milliónir minni, enn hann gjørdi, tá stjórin í fjør seldu partabrøv síni.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

BRÚKARIN

# Nú bløðini skriva, várt land fer um koll..

**Mangir løkir smáir birta stórar áir. Nú alt fer til himmals: Oljan, streymurin, tryggingin, matvørurnar og rentan er framvegis okkurt vit sjálvi kunnu gera, til tess at minka um privatnýtsluna.**



## Ongar pengar - men lekkrar negl!

Tær nýtist ikki at keypa dýrar vørur, um tú vilt hava blankar og sunnar negl. Smyr eitt tunt lag av vaselin á neglirnar, neglabondini og fingrarnar áðrenn tú fert í song. Og visti tú, at bíligur neglalakkfjernari frá matvøruhandlinum er betri enn dýru merkjavørurnar? Hetta vísir ein nýggj kanning hjá Politiken.

Fyll vaskimaskinuna – 30 stig er nóg mikið til klæði sum krevja 40 stig



## Hong klæðini upp

Hvørja ferð tú turkar eina maskinu við klæðum í turkitrumluni kostar tað næstan 7 krónur í streymi. So har er nógv at spara við at hanga klæðini upp. Eisini loysir tað seg at sentrifugera klæðini einaferð eyka í vaskimaskinuni. Hetta veit Kristianna Rein, orkuráðgevi hjá SEV, at siga okkum.



## Dankort: **Vissi vegurin til yvirtrekk..**

Tak eina ávísa upphædd út fyrst í mánaðinum til mat og klæði. Být pengarnar sundur í brævbjálvar; ein til hvørja viku. Skriva innkeypslista og tak bara reiðan pening við til handils.

Drekk vatn – tað er ókeypis !!

## - men sósin skal smakka

Eigur tú eina reyv av róma, reyðvíni, hvítvíni ella písakaðum róma, kanst tú frysta hana niður til eina himmalska sós eitt hugnaligt leygarkvøld.



## Heimagjørt pussikrem

- ½ kopp av mjøli
- ½ kopp av salti
- ½ kopp av vaskipulveri
- ¾ kopp av edikki
- ⅓ kopp av sitrónsaft
- ½ kopp av vatni

## Lat kreativitetin blóma

Endurnýtsla er bæði stuttlig, kreativ og persónlig. Í Tinghúsinum á Hjalla verða góðir og brúkiligir lutir seldir – lutir, sum annars høvdu farið á brennistøðina.

## Sparandi skíggjar

Farteldur og flatskermar brúka bert helvtina av streyminum sum vanligar teldur og eldri sjónvørp.